**Leiðreglur fyri at veita stuðul til ítrótt og frítíðarvirksemi**

**MENTAMÁLADEILDIN**

**§ 1 Endamál**

Stk. 1. Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanum, tiltøkum, átøkum og feløgum, sum ríka og menna ítróttar og frítíðarvirksemið í kommununi. Stuðul verður veittur samsvarandi játtan á fíggjarætlan kommununnar av hesi kontu: 5365 Stuðul til ítrótt og frítíðarvirksemi.

Aðrar leiðreglur eru fyri játtan av stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Stk. 2. Sum meginregla stuðlar kommunan virksemi, ið hevur tilknýti til kommununa ella er kommununi til gagns.

**§ 2 Verkætlanir, tiltøk og átøk, sum kunnu fáa stuðul**

Stk. 1. Stuðul kann verða latin til verkætlanir, tiltøk og átøk innan frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar. Eisini kann stuðul latast sum árligur rakstrarstuðul.

**§ 3 Raðfestingar**

Stk. 1. Mentamálanevndin kann á hvørjum ári seta upphædd av til ávíst stuðulsøki.

**§ 4 Umsókn og treytir**

Stk. 1. Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar so hvørt tær koma inn. Mentamálanevndin viðger stuðulsumsóknir á regluligu fundum sínum. Umsóknirnar skulu tó sendast inn í góðari tíð og vera kommununi í hendi í seinasta lagi 6 vikur, áðrenn tiltakið verður, ella verkætlanin fer í gongd.

Kunnað verður á heimasíðu kommununnar um stuðulsmøguleikarnar.

Stk. 2. Umsókn skal verða send inn ígjøgnum Vangan ella skrivað á serstakt umsóknarblað, sum fæst á heimasíðuni hjá kommununi.

Stk. 3. Stuðul verður ikki latin til verkætlanir, sum eru lidnar, ella tiltøk og átøk, sum hava verið.

Stk. 4. Kommunan kann biðja umsøkjara, sum fær stuðul, um at lata kommununi frágreiðing við roknskapi, tá tiltakið er lokið. Hetta verður gjørt saman við fráboðan um játtaðan stuðul.

Stk. 5. Møguligur ónýttur peningur verður at rinda kommununi aftur, og kommunan kann somuleiðis krevja stuðul afturgoldnan, hevur verkætlanin ella tiltakið havt avlop.

Stk. 6. Játtaður stuðul upp til 20.000kr er galdandi í 3 mánaðir eftir, at hann er játtaður.  Stuðul yvir 20.000kr er galdandi í 12 mánaðir frá tí, at hann er játtaður. Hetta er galdandi, um ikki annað er avtalað.

Stk. 7. Álagt verður umsøkjarum, sum fáa stuðul, at tilskila á uppsløgum, í skráum og aðrastaðni, har tað ber til, at Tórshavnar kommuna hevur veitt stuðul.

**§ 5 Viðgerð og avgerð um stuðul**

Stk. 1. Mentamáladeildin tekur ímóti umsóknum og fyrireikar tær til viðgerðar. Tá søkt verður um stuðul, ið er meira enn kr. 20.000,- verður málið beint í mentamálanevndina, ið tekur avgerð.

Stk. 2. Mentamáladeildin saman við trivnaðarstjóranum viðger og tekur avgerð samsvarandi krøvum í hesi reglugerð, tá stuðulsupphæddin er í mesta lagi kr. 20.000,-. Málini verða latin mentamálanevndini til kunningar.

**§ 6 Aðrar treytir**

Stk. 1. Atlit skulu takast til umhvørvi og umhvørvisvernd.

Stk. 2. Atlit skulu takast til fyribyrging í mun til børn og ung í sambandi við rúsdrekka.

Stk. 3. Mentamálanevndin kann, um serligar umstøður tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í hesum leiðreglum.

Stk. 4. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.

Leiðreglurnar eru samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs, tann 26. november 2025.